# Ársfrásøgn

fyri tíðina 01.01.14 - 31.12.14



WWW.ALS.FO

Arbeiðsloysisskipanin · Postsmoga 3022 · FO-110 Tórshavn
Tel 349550 · Fax 349551 · als@als.fo · www.als.fo

Print: Føroya Prent · Sett upp: Heiði Gásadal · Myndir: Miðlabreytin í Fjølmiðjuni & Birita Hansen (Fjølsmiðjan, Barnaheimið, Vakstrarhúsið)

# Upplýsingar um skipanina

**Arbeiðsloysisskipanin**
Tinghúsvegur 14
FO 100 Tórshavn
Telefon: 349550
Telefax: 349551
Heimasíða: www.als.fo
Roknskaparár: 01.01- 31.12

**STÝRIÐ**
Eyðfinnur Jacobsen, stýrisformaður
Georg Hansen
Herálvur Joensen
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Snorri Fjallsbak

**STJÓRN**
Magni á Deild Olsen, stjóri

**GRANNSKOÐAN**
JANUAR
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

## Innihaldsyvirlit


Upplýsingar um skipanina v.m. ........ 2
Leiðsluátekning ........ 4
Átekning frá óheftum grannskoðara ........ 5
Høvuðs- og lyklatøl ........ 6-7
Frágreiðing frá leiðslu ........ 8-24
Rakstrarroknskapur ........ 26
Fíggjarstøða ........ 27
Pengastreymsuppgerð ........ 28
Nýttur roknskaparháttur ........ 29-30
Notur til ársfrásøgnina ........ 31




## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2014 hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina við teimum tillaginum, sum stýrið hevur mett verið neyðugar, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2014 hjá Arbeiðsloysisskipanini og av úrslitinum av virkseminum og pengastreyminum hjá skipanini fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

*Tórshavn, tann 7. mai 2015*

**Stjórn**

**Magni á Deild Olsen**
stjóri

**Stýrið**

**Eyðfinnur Jacobsen**
stýrisformaður

**Magnus Pauli Glerfoss** **Marita Rasmussen** **Óluva í Gong**

**Snorri Fjallsbak** **Georg Hansen** **Herálvur Joensen**

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**TIL LEIÐSLUNA Í ARBEIÐSLOYSISSKIPANINI**

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, pengastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og lógini um ALS.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ein ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at skipanin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31.12.14 hjá Arbeiðsloysisskipanini og av úrslitinum av virkseminum og peningastreyminum hjá skipanini í roknskaparárinum 01.01.14 - 31.12.14 samsvarandi ársroknskaparlógini og lóg um ALS.

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sambært ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað sum ískoyti til grannskoðanina av ársroknskapinum. Útfrá hesum grundarlagi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

*Tórshavn, tann 7. mai 2015*

JANUAR
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

**Heini Thomsen**
Statsaut. revisor

# Høvuðstøl

| Upphædd í tkr. | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | | | | | |
| Inntøkur | 189.880 | 183.489 | 180.540 | 141.946 | 140.450 |
| Indeks | 135 | 131 | 129 | 101 | 100 |
| Útgjøld og útreiðslur, arbeiðsleys | -165.982 | -196.357 | -244.285 | -308.430 | -259.544 |
| Indeks | 64 | 76 | 94 | 119 | 100 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskriving | -1.686 | -35.553 | -84.496 | -184.833 | -138.447 |
| Indeks | 1 | 26 | 61 | 134 | 100 |
| Fíggjarligir postar, netto | 11.261 | 11.774 | 15.039 | 2.275 | 32.226 |
| Indeks | 35 | 37 | 47 | 7 | 100 |
| Ársúrslit | 5.518 | -28.520 | -77.096 | -189.320 | -112.157 |
| Indeks | -5 | 25 | 69 | 169 | 100 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Ogn tilsamans | 323.680 | 317.344 | 345.483 | 435.133 | 614.963 |
| Indeks | 53 | 52 | 56 | 71 | 100 |
| Eginogn | 312.399 | 306.881 | 335.402 | 412.498 | 601.817 |
| Indeks | 52 | 51 | 56 | 69 | 100 |
| **Pengastreymar** | | | | | |
| Nettopengastreymar frá: | | | | | |
| Rakstri | 2.062 | -25.793 | -87.252 | -175.126 | -115.431 |
| Íløgum | 0 | 0 | -2.532 | -5.525 | -9.516 |
| Pengastreymar í árinum | 2.062 | -25.793 | -89.784 | -180.651 | -124.946 |

# Lyklatøl

| | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Soliditetur** | | | | | |
| Eginognarpartur | 96,5% | 96,7% | 97,1% | 94,8% | 97,9% |
| **Annað** | | | | | |
| Ársverk í miðal | 39 | 34 | 29 | 25 | 21 |

Eginognarpartur $\dfrac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Ogn tilsamans}}$

**LYKLATØL**

Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá “Den Danske Finansanalytikerforenening”.



# Frágreiðing frá leiðslu

## Ársfrágreiðing

Tað gekk framá hjá Arbeiðsloysisskipanini í 2014. Árstíðarjavnaða arbeiðsloysið fyri alt árið var 3,8%, og var hetta tað lægsta síðani 2008. Arbeiðsloysið var rættiliga støðugt fallandi gjøgnum alt árið í 2014, og í desember mánaði kom tað niður á 3,3%.

Fíggjarliga royndist árið eisini væl – í øllum førum um borið verður saman við undanfarnu fýra árini, har samlaða hallið táttaði í 400 mió. krónur.

Ársúrslitið í 2014 gjørdist eitt avlop á stívliga 5,5 mió. krónur samanborið við eitt hall á 28,5 mió. krónur í 2013. Harvið batnaði ársúrslitið við stívliga 34 mió. krónum.

Við í ársúrslitinum er ein eingangsupphædd á 5,6 mió. krónur, sum stavar frá búnum eftir Faroe Seafood, sum fór av knóranum í 2010. Tá Faroe Seafood fór á húsagang stutt fyri jól í 2010, mistu útvið 700 fólk arbeiði. Fleiri fóru skjótt aftur til arbeiðis aftaná húsagangin, men tað vóru kortini oman fyri 400 fólk, sum komu í Arbeiðsloysisskipanina, og tey fingu mest sum alt fyri eitt arbeiðsloysisstuðul frá ALS, men høvdu kortini eitt lønarkrav móti búnum. Nú búgvið er gjørt endaliga upp, vísir tað seg, at ALS átti 5,6 mió. krónur til góðar í búnum. Ein upphædd, sum stavaði frá transportum í lønarkrøvunum hjá fólki, sum fingu arbeiðsloysisstuðul tá.

Verður hædd tikin fyri hesi eingangsupphæddini, so hevði ársúrslitið verið eitt lítið hall á stívliga 100 tús. krónur, og tað er alt annað enn nøktandi.

Tá arbeiðsloysið er so lágt, sum tað hevur verið í 2014, eigur Arbeiðsloysisskipanin at hava avlop og verða styrkt fíggjarliga, so skipanin hevur fíggjarligt fríholt og pengar at standa ímóti við, tá arbeiðsloysið aftur fer at vaksa.

Við tí arbeiðsloysinum, sum var í 2014, átti avlopið at havt verið einar 25-30 mió. krónur.

Orsøkin til, at so ikki var, er hon, at skipanin er ikki skrúvað rætt saman, og tí er tørvur á at gera tillagingar, so langtíðarhaldførið verður tryggjað, og skipanini verður lív lagað nógv ár inn í framtíðina.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina tekur hetta mál í størsta álvara, og hevur tí latið landsstýrismanninum við vinnumálum eitt tilmæli um at broyta ymisk viðurskifti í Arbeiðsloysisskipanini. Landsstýrismaðurin hevur tikið tilmælini til sín og hevur borið løgtinginum lógaruppskot, sum hevur við sær broytingar í lógini um ALS.

Við teimum broytingum, sum væntandi verða gjørdar í 2015, fer Arbeiðsloysisskipanin at hanga betri saman fíggjarliga, og hon fer at verða betri før fyri at standa ímóti vaksandi arbeiðsloysi, tá tað einaferð fer at koma.

Tilmælini hjá stýrinum hava støði í søguliga arbeiðsloysinum, og stýrið hevur gjørt av at tillaga Arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at tá arbeiðsloysið er niðanfyri 4,25-4,50%, so skal skipanin hava avlop, meðan hon hevur hall, tá arbeiðsloysið fer upp um 4,5%.

## Minkandi arbeiðsloysi

Arbeiðsloysið var í hæddini í nýggjari tíð í 2011, tá tað kom upp á 7%. Síðani hevur tað verið støðugt fallandi, og miðal arbeiðsloysið í 2014 var 3,8%.

Við tí arbeiðsstyrkini, sum er í løtuni, svarar eitt arbeiðsloysi á 3,8% til, at stívliga 1.000 fólk vóru fulltíðararbeiðsleys. Av teimum fingu oman fyri 800 fólk arbeiðsloysisstuðul frá ALS. Tey, sum ikki fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS, fáa vanliga forsorg vegna arbeiðsloysi frá Almannaverkinum.

Heldur gongdin í 2014 fram í 2015, og eingin óvanligur skelkur verður í føroyska búskapinum, so er hugsandi, at arbeiðsloysið verður uppaftur lægri í 2015.

## Gongdin í 2014

Í 2014 minkaði arbeiðsloysið rættiliga støðugt, sum árið leið og fram móti ársenda. Í november og desember mánaði kvinkaði tað kortini eitt sindur upp-

**Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld – ársmiðal**




**Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld – 2014**




**Talið av stovnaðum og strikaðum arbeiðsloysum árini 2008 til 2014**






eftir aftur. Í oktober og november mánaði var arbeiðsloysið 3,1%, og í desember fór tað upp á 3,3%.

### Færri komu í skipanina

Tá arbeiðsloysið minkar, eru tað eyðsæð færri, sum koma í Arbeiðsloysisskipanina, meðan fleiri fara úr henni.

Men hóast arbeiðsloysið yvirhøvur var lágt í 2014, so vóru tað hóast alt rættiliga nógv fólk, sum vóru arbeiðsleys í styttri ella longri tíðarskeið.

Tað vóru stovnaði samanlagt 1.631 arbeiðsloysi í 2014, meðan 1.868 fólk fóru úr skipanini.

Tað vóru á leið 150 persónar, sum gingu aftur, og sum gjørdust arbeiðsleys fleiri ferðir í 2014, so talan var um 1.478 einstaklingar, sum komu í Arbeiðsloysisskipanina í 2014.

Í 2013 vóru 2.072 arbeiðsloysi stovnað, so samanborið við tað er talan um eina minking á stívliga 21%.

Í mun til teir í miðal á leið 24.000 løntakararnar svarar tað til, at stívliga 6% av øllum løntakarum vóru arbeiðsleysir í styttri ella longri tíð í 2014.

Hesi seinastu sjey árini síðani 2008 hava 13.800 einstaklingar verið í Arbeiðsloysisskipanini, og tað svarar til, at omanfyri helmingurin av øllum løntakarum hesi árini hava verið í Arbeiðsloysisskipanini í styttri ella longri tíðarskeið.

### Føroyar hava lægsta arbeiðsloysið

Samanborið við onnur lond í Evropa, so var arbeiðsloysið í Føroyum við árslok í 2014 tað lægsta yvirhøvur. Sjálvt í Noreg, har arbeiðsloysið vanliga er lægri enn í Føroyum, var arbeiðsloysið við árslok nakað hægri enn í Føroyum.

### Fleiri løntakarar

Gongdin við minkandi arbeiðsloysi sæst í ávísan mun aftur í talinum av løntakarum, sum er vaksið sama tíðarskeið, sum arbeiðsloysið er minkað, og

**Arbeiðsloysið í mun til onnur lond**






**Tal av løntakarum í 2014**




**Lønargjaldingar árini 2000-2014**



sum síðani er minkað aftur, tá arbeiðsloysið vaks nakað í síðsta ársfjórðingi í 2014.

Hóast eitt ávíst samsveiggj er millum arbeiðsloysið og talið av løntakarum, so er samanhangurin ikki heilt greiður, m.a. tí summi fólk, sum eru farin aftur til arbeiðis, arbeiða uttanlands, men hava bústað í Føroyum. Tey fólkini síggjast ikki aftur í talinum av løntakarum.

Verður hugt eftir miðaltølunum av løntakarum seinastu fýra árini, so sær út til, at talið hevur verið hækkandi úr á leið 23.400 í 2011 til beint omanfyri 24.000 í miðal í 2014.

### Lønargjaldingarnar hækka

Samlaðu lønargjaldingarnar hildu á at hækka í 2014, og komu upp á stívliga 7,5 mia. krónur, sum er 366 mió. krónur meiri enn í 2013, svarandi til ein vøkstur á 5,1%.

Hesar upphæddir eru í ársins prísum. Verða lønargjaldingarnar leiðrættaðar fyri prísvøkstrinum, verður vøksturin meiri avmarkaður.

### Fólk steðga styttri hjá ALS

Hesi seinastu árini frá 2009 til 2013 hava víst, at fólk, sum einki arbeiði hava havt, hava verið longri og longri arbeiðsleys. Tey fólkini, sum fóru úr skipanini í 2013, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 254 kalendaradagar.

Tann gongdin vendi í 2014.

Fólkini, sum fóru úr aftur ALS í 2014, høvdu í miðal steðgað 227 kalendaradagar í skipanini. Tað vil siga, at tey í miðal eru farin á leið ein mánað fyrr aftur til arbeiðis enn tey, sum fóru úr skipanini árið fyri.

Verður hugt eftir, hvussu leingi tey fólkini, sum til eina og hvørja tíð eru í skipanini, hava verið arbeiðsleys, so er myndin tann sama.

Tað vísir seg, at tíðarskeiðini, fólk hava verið arbeiðsleys, eru vorðin alsamt styttri síðani á sumri í 2012 og fram til árslok í 2014.

Hetta at fólk steðga styttri er sera jaligt, og tað er eitt av aðalmálunum hjá ALS, at fólk fara so skjótt aftur til arbeiðis sum til ber.

Tað eru tað fleiri orsøkir til.

Ein er, at inntøkumissurin hjá hesum fólkum verður meiri avmarkaður, enn um tey eru leingi arbeiðsleys.

Ein onnur er, at tað er ikki gott fyri menniskju at vera arbeiðsleys. Tað ávirkar kropp og sál, og eisini sosialu viðurskiftini verða nervað av arbeiðsloysinum. Tí er umráðandi at koma aftur til arbeiðis sum skjótast.

Tað hevur eyðsæð eisini stóran týdning, at føroyskir arbeiðsgevarar fáa tey starvsfólkini og teir førleikarnar, teimum tørvar, og fyri Arbeiðsloysisskipanina er tað ein fíggjarligur fyrimunur, tá arbeiðsloysið er lágt, og fólk ikki steðga leingi í skipanini.

Tølini eru miðaltøl fyri øll tey, sum hava verið í Arbeiðsloysisskipanini, og tað eru eyðsæð stórir munir á, hvussu leingi fólk steðga. Summi – serliga tey ungu – steðga stutt og fara skjótt aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg, meðan tað er ein størri avbjóðing hjá teimum eldru at vinna seg útaftur á arbeiðsmarknaðin.

Hóast yvirskipaði boðskapurin er hin sami, so er ein ávísur munur á, hvussu leingi, tey, sum eru farin aftur til arbeiðis, hava steðgað, og hvussu leingi tey, sum eru í skipanini, hava steðgað.

Myndin niðanfyri vísir, at tey, sum eru farin úr skipanini aftur, hava í miðal steðgað styttri enn tey, sum eru í skipanini. Tað kann týðast soleiðis, at tað eru tey feskastu – tey, sum eru vorðin arbeiðsleys síðst – sum fyrst fara aftur til arbeiðis, meðan tey, sum hava verið longri arbeiðsleys, hava truplari við at koma sær aftur til arbeiðis.

Ikki óvæntað er ein rættiliga greiður samanhangur millum generella arbeiðsloysið í Føroyum og longdina á tíðini, fólk eru arbeiðsleys. Tá arbeiðsloysið – mátað sum fulltíðararbeiðsleys í % av samlaðu arbeiðsarafjøldini – minkar, so eru fólk yvirhøvur styttri arbeiðsleys. Tað vil siga, at tað ganga færri dagar frá tí, fólk gerast arbeiðsleys, til tey úr Arbeiðsloysisskipanini aftur, og tá arbeiðsloysið hækkar, eru fólk longri arbeiðsleys.

### Færri detta út

Sambært reglunum ber til at vera í Arbeiðsloysisskipanini í 648 útgjaldsdagar í eitt trý ára skeið.

Tað merkir, at tá ein persónur røkkur hesar 648 dagarnar, so kann viðkomandi ikki longur fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS og dettur tí úr skipanini.

Tey trý árini frá 2008 og fram til 2010 vóru tað í miðal á leið 20-30 fólk, sum rukku fullum dagatali og duttu úr skipanini.

Í 2011 vaks talið munandi, og tey trý árini frá 2011 til 2013 var talið á fólkum, sum duttu úr skipanini, árliga millum 100 og 140.

Hóast talið enn var høgt í 2013, so vendi gongdin tá, og talið fór at minka. Í 2014 vóru tað bara 45 fólk, sum duttu úr skipanini vegna fult dagatal.

Hóast talið enn er ov høgt – helst skal eingin detta úr Arbeiðsloysisskipanini, tí tey hava brúkt allar 648 dagarnar – so er at fegnast um, at talið hóast alt er munandi lægri, enn tað hevur verið undanfarnu árini.

### Snýr seg um at fara fyrr aftur til arbeiðis

Sannføringin um týdningin at hava eitt arbeiði at fara til og at hava ein skipaðan gerandisdag, har fólk hava møguleikan at vera saman við øðrum, er sterkari nú enn nakrantíð.

Tí verður nú enn størri dentur lagdur á at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis. Amboðini til tað eru fleiri. Arbeiðsloysisskipanin hevur í hesum árinum styrkt um arbeiðsávísingina, sum er tann parturin av ALS, sum arbeiðir tættast saman við føroyskum arbeiðsgevarum. Tveir virkisráðgevar afturat tóku við starvi í mai-mánaði, og samstarvið við arbeiðsgevararnar er munandi styrkt, og vitanin um tørvin á arbeiðsmegi er eisini vorðin størri og greiðari.

Tað er vorðið alsamt meiri vanligt, at arbeiðsgevarar sum eitt tað fyrsta venda sær til ALS, tá teimum tørvar arbeiðsmegi, og í flestu førum eydnast tað at knýta samband millum arbeiðsgevarar, sum mangla arbeiðsmegi, og fólk, sum brennandi ynskja sær eitt arbeiði.

Hetta tilvitið hjá arbeiðsgevarunum um, at ALS er ført at hjálpa teimum, tá teimum manglar fólk, byggir í stóran mun á álit. Álit á, at ALS veruliga kann veita teimum røttu starvsfólkini við røttu førleikunum, og tí er umráðandi, at vit á ALS kenna okkara viðskiftafólk.

Til tess at fáa neyðugu vitanina um viðskiftafólkini – hvørjum tey brenna fyri, hvat fyri størv, tey leita eftir, og hvat tey duga og tíma – er neyðugt at knýta tættari sambond við tey. Hetta at knýta tættari sambond hevur verið arbeitt miðvíst við seinnu árini, og ALS hevur skipað fyri hópin av verkætlanum og tikið stig til eina rúgvu av ymsum átøkum við júst tí endamáli at knýta tættari sambond við kundarnar.

Sannlíkt størsta átak av sínum slagi í søgu ALS var, tá Arbeiðsloysisskipanin beint eftir ársskiftið fór undir eina verkætlan, sum snúði seg um at hava

**Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys – bert tey, sum eru farin úr skipanini**




**Miðallongd á arbeiðsloysi býtt á kyn og aldursbólkar**



persónligar samrøður við øll tey á leið 1.000 fólkini í skipanini. Hetta var eitt stórt og framsøkið mál, vit settu okkum, og tað tók langa tíð og kravdi nógva orku av øllum starvsfólkunum. Úrtøkan av samrøðunum var hon, at ALS fekk eina munandi betri fatan av støðuni hjá teimum arbeiðstøku og av, hvussu Arbeiðsloysisskipanin best kann virka fyri, at tey koma fyrr aftur til arbeiðis.

Av øðrum verkætlanum er Fjølsmiðjan á Hjalla sannlíkt mest ítøkilig og sjónlig.

Arbeiðsloysisskipanin hevur í eina tíð arbeitt við at fyrireika eitt størri umhvørvi, har viðskiftafólkini kunnu koma at vera saman við øðrum at styrkja teirra yrkisligu førleikar og eisini at hvessa sosialu førleikarnar samstundis, sum ALS hevur eitt betri og meiri skipað samband við tey.

Frá fyrsta august hevur ALS tí leigað stóra virkisbygningin á Hjalla, sum P/f Fastogn eigur. Í tað umhvørvið koma fólk fýra dagar um vikuna at førleikamenna seg og læra ymiskt nýtt. Tey fáa høvið at fáa ein skipaðan gerandisdag, har tey eru virkin saman við øðrum og knýta sambond við onnur, meðan tey framleiða ymiskt á teimum fýra breytunum, sum eru í Fjølsmiðjuni.

Í Fjølsmiðjuni verður eisini skipað fyri átøkum fyri ávísum yrkisbólkum. Eitt nú hava arbeiðsleysir lærarar hitst í Fjølsmiðjuni. Eisini sjúkrarøktarfrøðingar og námsfrøðingar eru komnir saman at tosa um støðuna innan júst teirra yrki og um, hvussu møguleikarnir hjá teimum at koma aftur til arbeiðis kunnu gerast betri.

Tey ungu er ein bólkur, sum altíð verður vístur serligan ans. Tað hevur serliga stóran týdning, at tey ungu ikki missa sambandið við arbeiðsmarknaðin á einum ungum aldri. Tí hevur ALS áhaldandi samband við hendan bólkin, til tess at eggja teimum til at finna sær eitt arbeiði ella at fara undir at útbúgva seg.

Virksemið í Vakstrarhúsinum í Sandavági, sum ALS hevur leigað seinastu trý árini, heldur fram, og við nýggja starvsfólkinum, sum hevur fasta støð í Suðuroy, ber nú eisini til at knýta tættari sambond við tey har suðuri, sum eru í skipanini, og sum leita sær eftir arbeiði.

**Miðallongd – kalendaradagar**




**Tal av fólkum, sum eru dottin út vegna fult dagatal**




Tætta samstarvið við Smyril Line at manna Norrönu við føroyingum hevur aftur givið góð úrslit í ár. Væl fleiri føroyingar hava loyst útlendingar av umborð, og bæði ferðafólk og reiðarí hava lagt til merkis, at tænastustøðið er hækkað, síðani føroyingar komu umborð.

Samstarvið við Smyril Line er eitt talandi dømi um, at tað ber til at fáa í lag góð og gevandi samstørv við arbeiðsgevarar. Samstørv, sum hava við sær nýggjar møguleikar, og sum gera, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis.

Tað vísir seg eisini at vera vaksandi tørvur á eini vælvirkandi vikarskipan í Føroyum.

Tað er í heilum, at arbeiðsgevarar venda sær til ALS at vita, um vit við stuttum skotbrái kunnu veita teimum avloysarar í nakrar dagar ella viðhvørt bara nakrar tímar.

Fyri at betra um hesa tænastuna eisini, hevur ALS gjørt íløgu í eina nýggja kt-skipan, sum er serliga ment til vikarstovur. Við hesum amboðunum fer at bera til hjá ALS at veita arbeiðsgevarum eina enn betri tænastu í mun til vikarar til fyrifallandi, styttri størv.

Av øðrum verkætlanum kunnu nevnast, at starvsfólk hjá ALS aftur í ár settu epli niður saman við viðskiftafólkunum. Tá avtornaði vórðu sløk 7 tons av eplum tikin upp, tá komið var út á heystið. Her var aftur talan um eina samfelagsgagnliga verkætlan, sum gevur góða meining, og sum var eitt frálíkt høvi at hitta okkara viðskiftafólk og knýta tættari sambond við tey.

Samstarvið við Tekniska skúla helt fram. Aftur í ár vóru fólk úr Arbeiðsloysisskipanini á skeið í tríggjar mánaðir á timburdeildini hjá Tekniska Skúla, har tey lærdu at arbeiða við timbri. Ítøkiliga úrslitið av tí skeiðinum var, at skeiðsluttakararnir smíðaðu ymisk hús og aðrar leikur til børnini á Barnaheiminum.

Hetta var enn eitt dømi um eina samfelagsgagnliga verkætlan, har luttakararnir fáa ítøkiligar førleikar, tey kunnu nýta á síni yrkisleið.

Nógvir av útlendingunum, sum flyta til Føroyar, eru í eini serligari óhepnari støðu í mun til arbeiðsmarknaðin og í mun til at finna týðandi størv, sum standa mát við teirra førleikar.

Mangan er talan um vælútbúgvið fólk, sum tíverri ikki sleppa at gagnnýta sínar útbúgvingar og sínar førleikar til fulnar. Ofta tí tey ikki duga føroyska málið.

Í eini roynd at bøta um hesi viðurskifti hevur ALS í samstarvi við Kvøldskúlan í Havn skipað fyri skeiði í føroyskum máli og føroyskari mentan, har fólk av útlendskum uppruna, sum eru í Arbeiðsloysisskipanini, fáa høvið at luttaka og læra meiri um hetta nýggja landið, tey eru komin at búgva í.

Fyrsta skeiðið av hesum slagi er liðugt, og úrslitini eru góð. Fólkini, sum hava luttikið, lata væl at og siga seg hava lært hópin av nýggjum, sum kann hjálpa teimum í einum nýggjum, avbjóðandi gerandisdegi í einum fremmandum landi.

Tað er ætlanin, at hetta samstarvið við Kvøldskúlan heldur fram, og møguliga verður skipað fyri einum framhaldsskeiði fyri hesi fólkini.

Royndirnar, vit á ALS hava gjørt okkum, bera týðilig boð um, at tørvurin á eini skipaðari vaksnamannalæru er stórur. Tørvurin hjá arbeiðsgevarum á førleikum broytist áhaldandi, og tað er umráðandi, at útboðið av arbeiðsmegi stendur mát við tørvin hjá arbeiðsgevarunum. Tí er umráðandi, at fólk fáa umstøður at førleikamenna seg – bæði við styttri skeiðum, men eisini við nakað longri útbúgvingum. Til tað eru umstøðurnar ikki nøktandi sum er, og vit á Arbeiðsloysisskipanini vilja fegin taka lut í og virka fyri, at vit í samstarvi við avvarðandi myndugleikar kunnu fáa eitt gott og vælvirkandi umhvørvi, har vaksin fólk kunnu útbúgva seg og harvið bøta um fyritreytirnar fyri at fáa góð og varandi størv, og at føroyskir arbeiðsgevarar harvið eisini fáa tey skikkaðu starvsfólkini, teimum tørvar.

Árið 2014 hevur eins og undanfarin ár verið eitt ár við nógvum øðrvísi og fjølbroyttum virksemi, har serligur dentur hevur verið lagdur á at koma í tættari samband við bæði arbeiðsgevararnar og við tey arbeiðstøku, sum leita eftir arbeiði.

Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysi hevur við sær.

Í eldhuginum eftir at sleppa at gera mun eiga vit á Arbeiðsloysisskipanini kortini altíð at hava í huga, at tað eru menniskju, vit arbeiða saman við. Menniskju, sum eru komin í tí keðiligu støðu, at tey einki arbeiði hava. Tí eiga vit altíð at vera ansin og hava virðing fyri hesum menniskjum, og tað, vit taka stig til, má geva meining – bæði fyri tey og fyri okkum á ALS. Við tí virðingini í huga eru vit sannførd um, at ALS eigur og kann gera mun, og at vit eiga at hava

ein virknan leiklut í at stuðla fólki í aftur at nærkast arbeiðsmarknaðinum.

## Nýggj avtala við Danmark

Tann 20. november 2014 var nýggj avtala millum Føroyar og Danmark undirskrivað. Við nýggju avtaluni verður lættari hjá fólki, sum fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS, at fara til Danmarkar at leita sær arbeiði og øvugt hjá fólki í donskum a-kassum at koma til Føroyar at leita sær arbeiði.

Avtalan inniber, at fólk nú kunnu taka verandi arbeiðsloysisstuðul við sær til Føroyar ella Danmark í upp til 3 mánaðir, meðan tey leita sær arbeiði.

Avtalan er galdandi fyri øll, sum fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS, og fyri allar limir í donskum a-kassum. Men hon er kanska serliga viðkomandi hjá føroyingum, sum búgva uttanlands, og sum kundu hugsað sær at flutt aftur til Føroyar at búgva og arbeiða.

## Ársfundurin

Í mai-mánaði í 2013 var fyrsti ársfundurin eftir ein steðg síðani miðskeiðis í nítiárunum hildin. Eingin ársfundur var í 2014, men í mai 2015 verður ársfundur aftur.

Ársfundurin er at meta sum eitt slag av aðalfundi, har tey, ið varða av Arbeiðsloysisskipanini, hava høvið at kunna seg um virksemið, um støðuna og um útlitini fyri framtíðina.

## Lógarbroytingar:

Ongar lógarbroytingar eru gjørdar í 2014, men stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina hevur latið landsstýrismanninum tilmæli til lógarbroytingar og broytingar í ymsum kunngerðum.

Lógarbroytingarnar fevna serliga um hesi viðurskifti:

- Bíðidagarnir verða færri og verða tengdir at inntøku
- Fólk fara at hava skyldu at taka virkið lut í arbeiðsmarknaðarátøkum
- Karantenan til tey, sum verða burturvíst og sum siga seg sjálvan úr starvi við ongari haldgóðari orsøk, verður longd úr 4 vikum upp í 8 vikur
- Inngjaldsloftið verður hækkað úr 520 tús. krónum upp í 650 tús. krónur
- Skipanin við ALS-farloyvi verður skerd, so hon bara virkar, tá arbeiðsloysið er oman fyri 6%
- Tíðarskeiðið, sum fólk kunnu koma upp á fult dagatal (648 dagar), verður longt úr trimum upp í fýra ár
- Fólk, sum fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært forsorgarlógini, verða fevnd av Arbeiðsloysisskipanini

Umframt lógarbroytingarnar hevur stýrið mælt landsstýrismanninum við kunngerð at gera broytingar í fiskavirkisskipanini, í skipanini við starvsvenjingum og at hækka gjøldini fyri sjálvboðnar tryggingar og tryggingar hjá sjálvstøðugum vinnurekandi.

## Fasti Gerðarrættur

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrætt at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2014 var samlaða upphæddin 67 tús. krónur.

## Trygdargrunnur fiskivinnunar

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnunar um, at tey halda til í hølunum hjá ALS.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin ALS 1,2 mió. krónur í 2013.

Trygdargrunnurin fór í 2014 undir at endurnýggja kt-undirstøðukervið hjá grunninum. Í tí sambandi hevur ALS sett fólk í starv at samskipa og stýra tí verkætlanini, og Trygdargrunnurin ber ALS allar útreiðslur av hesum aftur.

## Stýrið

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn.

Stýrið, sum situr nú, tók við 1. oktober 2013, og hevur verið óbroytt síðani.



## Inngjøldini hækkaðu aftur

ALS-gjaldið hevur verið 1,25% síðani 1. januar 2012, og síðani hevur verið ein støðugur vøkstur í samlaðu inngjøldunum hjá ALS.

Í 2013 vóru tey 183,5 mió. krónur, og í 2014 komu tey upp á 189,9 mió. krónur. Ein vøkstur á 6,4 mió. krónur svarandi til 3,5%.

Hækkanin er úrslit av, at samlaðu lønarútgjaldingarnar í Føroyum hækkaðu í 2014.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í ALS-gjaldinum og samlaðu inngjøldunum síðani Arbeiðsloysisskipanin varð stovnað í 1992. Gula strikan vísir ALS-gjaldið, meðan stabbarnir vísa samlaðu inngjøldini.

## Útgjøldini halda á at minka

Síðani arbeiðsloysið í 2011 var upp á tað mesta í nýggjari tíð, er tað støðugt minkað, og harvið eru eisini útgjøldini minkað støðugt.

Í 2014 vóru samlaðu útgjøldini 166 mió. krónur, sum eru stívligar 30 mió. krónur minni – svarandi til 15,5% – enn í 2013.

Tað eru serliga vanligu útgjøldini, sum eru nógv minkað í 2014. Úr 151,7 mió. krónum í 2013 niður í 120,8 mió. krónur í 2014. Ein minking á 30,9 mió. krónur, sum svarar til 20,4%

Útgjøldini umvegis fiskavirkisskipanina eru minkað nakað, men ikki so nógv sum vanligu útgjøldini. Lutfalsliga er minkingin í útgjøldunum um fiskavirkisskipanina 8% í mun til árið frammanundan.

Eisini kostnaðirnir av starvsvenjing eru minkaðir í 2014. Hetta hevur kortini ikki so stóran peningaligan týdning, tí hesar upphæddirnar høvdu óansæð verið goldnar út sum vanligur arbeiðsloysisstuðul, hevði eingin starvsvenjing verið.

Vaksandi denturin, sum verður lagdur á førleikamenning og arbeiðsmarknaðarátøk, sæst aftur í upphæddunum, sum verða brúktar til hesi endamál. Í 2013 vóru 4,2 mió. krónur brúktar, meðan upphæddin í 2014 var 8 mió. krónur. Hækkingin stavar serliga frá Fjølsmiðjuni og teimum kostnaðunum, sum eru knýttir at henni.

**ALS-gjald og samlað inngjøld 1992-2014**




## Samlað útgjøld 1992-2013

Samlaðu útgjøldini eru býtt soleiðis seinastu árini:

| Mió. krónur | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| Vanligur arbeiðsloysisstuðul | 120,8 | 151,7 | 199,6 |
| Starvsvenjing | 11,7 | 12,6 | 13,6 |
| Fiskavirkisskipanin | 22,6 | 24,4 | 20,8 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 2,9 | 3,4 | 4,3 |
| Førleikamenning og arbeiðsmarknaðarátøk | 8,0 | 4,2 | 6,0 |
| | **166,0** | **196,4** | **244,3** |

## Lønir og kostnaðir

Talið av starvsfólkum hevur verið vaksandi seinnu árini, og í miðal vóru 39 ársverk á ALS í 2014. Hetta er 5 fleiri enn í 2013.

Orsøkin, til at tað eru fleiri starvsfólk á ALS, er hon, at framsóknin – ambitiónirnar – eru størri og øðrvísi, og at ALS í enn størri mun vil stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, so at neiligu árinini av arbeiðsloysi verða so avmarkað sum yvirhøvur til ber.

Tað sæst aftur í talinum av starvsfólkum á tann hátt, at tað eru fleiri starvsfólk, sum hitta og hava samband við viðskiftafólkini, og sum saman við teimum virka fyri, at tey koma skjótari aftur til arbeiðis.

Arbeiðsloysi er í øllum landinum, og fyri betri at røkka teimum viðskiftafólkunum, sum ikki búgva nærhendis miðstaðarøkinum, hevur ALS nú starvsfólk í Suðuroy, og eftir at samstarvið við Runavíkar Kommunu um skúlan í Søldarfirði helt uppat, hevur ALS latið upp skrivstovu í Saltangará. Harvið er ALS betri umboðað í nærumhvørvinum, har viðskiftafólkini búgva, og harvið eru fyritreytirnar fyri at veita eina betri tænastu eisini betri.

Tað eru eisini fleiri starvsfólk, sum arbeiða tættari saman við arbeiðsgevarunum, so hesir sum skjótast fáa fatur á teirri skikkaðu arbeiðsmegini, teimum tørvur.



**Samlað útgjøld 1992-2014**



Alt meðan tað eru fleiri starvsfólk á hesum økjum, so er starvsfólkatalið tað sama á øðrum økjum, eitt nú innan fyrisiting.

Samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar vóru 15,9 mió. krónur í 2014. Tað er ein sløk mió. krónur meiri enn í 2013. Hetta meta vit á ALS vera eina góða íløgu, sum sparir seg skjótt innaftur, tí tá fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, rindar ALS minni út í arbeiðsloysisstuðli.

Av tí at roknskaparligu handfaringarnar av íløgum vóru broyttar 1. januar 2013 soleiðis, at mest sum øll keyp, sum árini frammanundan hava verið handfarin sum íløgur, nú verða útreiðsluførd alt fyri eitt umvegis raksturin, ber ikki einfalt til at samanbera útreiðslurnar í roknskapunum áðrenn og aftaná 2013.

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir vóru 9,7 mió. krónur í 2014. Samanborið við 2013 er talan um ein vøkstur á hálvaaðru mió. krónur. Orsøkin til vøksturin er fyrst og fremst hon, at munandi umvælingar vóru gjørdar á bygningin á Tinghúsvegnum. Men eisini aðrar lutfalsliga stórar útreiðslur, sum ikki koma aftur, hava verið í 2014. Hetta eru útreiðslur í tól, skipanir og tænastur, sum fara at gera, at tað ber til at spara enn meiri komandi árini.

Verður hædd tikin fyri hesum serligu útreiðslunum, sum ikki eru afturvendandi, so høvdu samlaðu rakstrarkostnaðirnir í 2014 verið áleið eina mió. krónur – sløk 13% – lægri enn í 2013.

Verður hædd tikin fyri roknskapartøkniligu broytingunum og eingangsútreiðslum, so er tað vorðið alsamt bíligari at reka ALS hesi seinastu fýra árini.

Myndin á næstu síðu vísir gongdina í samlaðu fyrisitingarútreiðslunum, avskrivingunum og mvg seinastu 10 árini. Upphæddirnar eru í føstum 2004-prísum.

Sum myndin vísir, so eru hesar útreiðslur minkaðar úr 13,6 mió. krónum í 2010 niður í 11,3 mió. krónur í 2014. Ein minking á sløk 18% eftir fýra árum.

Gongdin við munandi sparingum seinnu árini er úrslit av einum miðvísum arbeiði at fáa meiri fyri minni og spara allastaðni, har tað loysir seg og gevur meining. Miðað verður eftir, at hesar útreiðslur fara at minka enn meiri komandi árini, og at ALS framhaldandi verður bíligari at reka.

Í 2014 vóru óvanliga stórar upphæddir, sum ALS átti til góðar hjá viðskiftafólkum, staðfestar sum mistar. Samlaða upphæddin var 356 tús. krónur samanborið við 48 tús. krónur árið fyri. Eisini er avsetingin til miss av ágóða hækkað munandi í 2014. Úr 10 tús. krónum í 2013 upp í 173 tús. krónur í 2014.

Orsøkirnar til hesar broytingar eru, at eftirlitið er komið fram á mál, har fólk hava fingið ov nógv útgoldið, og tá málini hava verið fyri í rættinum, er vorðið staðfest, at hesi fólk megna ikki at gjalda skuldina aftur, og tí eru missirnir staðfestir endaliga.

Hóast mista upphæddin var óvanliga høg í 2014, so er einki, sum bendir á, at hetta fer at halda fram, tí ALS hevur eitt gott og vælvirkandi eftirlit við tí, ið fer fram, og teimum upphæddum, sum verða goldnar út.

## Ársúrslit og eginogn

Tekniska úrslitið, sum er munurin millum inntøkur og útreiðslur til arbeiðstøk, var eitt avlop á 24 mió. krónur. Í 2013 var talan um eitt hall á 12,9 mió. krónur. Harvið er tekniska úrslitið batnað við 36,8 mió. krónum.

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt hall á 1,7 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt hall á 35,6 mió. krónur í 2013.

Avskrivingarnar í 2014 vóru 2,2 mió. krónur samanborið við 2,9 mió. krónur í 2013. Í 2014 vóru allar ognir burtursæð frá grundøkinum og bygninginum við Tinghúsvegin endaliga avskrivaðar, og tá øll keyp, sum frammanundan hava verið handfarin sum íløgur og avskrivað yvir fleiri ár, nú verða útreiðsluførd yvir raksturin, so fara samlaðu avskrivingarnar at minka munandi. Í árunum sum koma, verður tað bara bygningurin við Tinghúsvegin, sum verður avskrivaður. Tær av-

**Samlaðir rakstrarkostnaðir 2004-2014 í ársins prísum**




**Fyrisitingarútreiðslur, avskrivingar og mvg í føstum 2004-prísum**



skrivingarnar fara at verða stívliga 200 tús. krónur árliga.

Inntøkurnar frá fíggjarognunum vóru heldur lakari í 2014 samanborið við undanfarna ár. Inntøkurnar gjørdust 11,3 mió. krónur í 2014 mótvegis 11,8 mió. krónur í 2013. Ein minking á hálva mió. krónur.

Gongdin í úrslitinum batnaði triðja árið á rað, og fyri fyrstu ferð í fimm ár vísir ársroknskapurin eitt avlop. Hesaferð á 5,5 mió. krónur.

Úrslitið fyri 2014 er sostatt 34 mió. krónur betri enn árið frammanundan.

Við árslok í 2014 vóru samlaðu íløgurnar í virðisbrøv 268,8 mió. krónur, sum var slakar tvær mió. krónur minni enn eitt ár frammanundan.

Tøki peningurin er hinvegin øktur úr 7,9 mió. krónum upp í 11,7 mió. krónur.

Við ársbyrjan í 2014 var eginognin 306,9 mió. krónur, og við árslok var eginognin vaksin upp í 312,4 mió. krónur.

Tá eginognin var størst, tað var í august mánaði í 2009, var hon stívliga 743 mió. krónur. Nú 5-6 ár seinni ber til at staðfesta, at hon er minkað við oman fyri 430 mió. krónum. Gongdin hesi árini vísir, at tað kann vera skjótt hvønn vegin, og at eginognin og harvið fíggjarligi mátturin hjá skipanini kann vikna skjótt, og tað vísir týdningin av at fáa skipanina í eina trygga legu, so hon verður fíggjarliga haldfør nógv ár fram í tíðina.

## Útlit fyri 2015

Hóast Búskaparráðið væntar lægri búskaparvøkstur komandi árini, so verður hóast alt roknað við vøkstri, og tekin eru um, at jaliga gongdin við nógvum virksemi og lágum arbeiðsloysi fer at halda fram í 2015 eisini.

Tað eru fleiri stórar byggiverkætlanir í gongd og sum halda fram í 2015, og ítøkiligar ætlanir eru um at fara undir aðrar stórar byggiverkætlanir komandi tíðina. Byggingin av Marknagilsdeplinum heldur fram, nýggjur Vesturskúli skal eftir ætlan byggjast í Havn, og Landssjúkrahúsið skal byggjast út. Á Glyvrum eru tey hjá Bakkafrost farin undir at byggja nýggjan, stóran virkisbygning, og fyrstu fyrireikingarnar eru farnar í gongd til báðar teir nýggju undirsjóvartunlarnar. Tosað hevur eisini verið um at byggja havnalagið í Havnini út fyri stórar upphæddir.

Tað er nú so stórur tørvur á fólki innan byggivinnuna, at tað eru ov fáir føroyingar við neyðugum førleikum tøkir, og tí er neyðugt hjá byggifyritøkunum at fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða.

Í desember mánaði bað Vinnumálaráðið ríkismyndugleikarnar seta skipanina um arbeiðsmegi úr ES-londum í gildi aftur. Hetta er sama skipan, sum var galdandi frá 1. juni 2008 fram til 27. november 2009, sum merkir, at útlendingar úr ES-londum, sum hava eitt arbeiðstilboð frá einum føroyskum arbeiðsgevara í Føroyum upp á í minsta lagi 30 tímar um vikuna, kunnu fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Hetta er tó treytað av, at arbeiðsloysið í Føroyum er niðanfyri 3,5%.

Hendan broytingin fer at gera tað lættari hjá føroyskum arbeiðsgevarum at fáa skikkaða arbeiðsmegi, men vónandi fara teir kortini fyrst at geva arbeiðsleysum føroyingum møguleikan at koma aftur til arbeiðis, áðrenn útlendingar koma hendavegin at arbeiða.

Samstundis sum virksemið innan byggivinnuna er í hæddini í Føroyum, so eru tekin um, at tað er minni at gera innan eitt nú oljuvinnuna í Noreg. Oljuprísurin er nógv minkaður í 2014, og tað hevur havt við sær, at íløgurnar innan hesa vinnuna eru minkaðar. Javnan frættist um hópuppsagnir hjá fyritøkum, ið starvast innan hesi øki, og eisini eftirspurningurin eftir føroyskari arbeiðsmegi í Noreg tykist vera minkaður. Tí eru fleiri av hesum fólkum komin aftur til Føroyar og eru nú tøk á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Hóast vakstrarmøguleikarnir hjá alivinnuni kunnu tykjast avmarkaðir við verandi tøkni, so gongur enn væl hjá hesi vinnu. Við útbyggingum av smoltstøðunum kunnu smoltini ganga longri á landi og harvið vera størri, tá tey fara á sjógv. Á henda hátt ber til at stytta um tíðina, laksurin er í sjónum, og tí ber til at økja nakað um samlaðu framleiðsluna. Laksalúsin er kortini enn ein avbjóðing hjá alivinn-

**Ársúrslit 1992-2014**




**Eginogn 1992-2014**



uni. Ein avbjóðing, ið kann gerast ein verulig hóttan, um bilbugt ikki fast við henni.

Tað gongur væl hjá pørtum av fiskivinnuni á sjónum. Serliga væl gongur hjá uppsjóvarskipunum, men eisini hjá langfaratrolarunum gongur væl. Verri stendur til hjá tí partinum av flotanum, sum fiskar undir Føroyum. Veiðan eftir botnfiski undir Føroyum heldur fram at minka, og hevði tað ikki verið fyri kvotunum í íslendskum sjógvi og við Flemish Cap, hevði sannlíkt sansað enn meiri at hjá fleiri.

Hóast tað ikki eru útlit til, at kvoturnar av uppsjóvarfiski fara at vaksa komandi árini, koma longu nú stórar nøgdir av uppsjóvarfiski upp á land í Føroyum, og tá árstíðin er, er heilt nógv arbeiði á teimum trimum virkjunum, sum virka hesi fiskasløg. Árið 2015 verður fyrsta heila árið, Pelagos í Fuglafirði fer at virka, og hjá teimum verða sannlíkt eisini nógv ársverk i 2015.

Ein óloyst avbjóðing er enn sum áður stóra hallið á fíggjarlógini. Hóast vandin av at landið hevur hall á fíggjarlógini í nøkur ár ikki nýtist at vera so stórur, so er tað valla haldført framhaldandi at hava trivalig hall í longri tíðarskeið.

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at hallið skal vera burtur í 2016. Hvussu hall verður vent til javnvág ella avlop er ikki greitt, men umframt størri inntøkur frá fiski- og alivinnuni, er eitt amboð sannlíkt sparingar innan tað almenna, og tað kann fara at hava við sær minni virksemi, og at arbeiðsloysið aftur fer at kvinka uppeftir.

Samanumtikið sær hóast alt út til, at nógv virksemi verður í 2015, og roknað verður við, at arbeiðsloysið fer at minka niðurum støðið, sum var í 2014.

Skuldi tað kortini hent, at arbeiðsloysið longu aftur fer at vaksa, so er enn størri tørvur á at tillaga Arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at langtíðarhaldførið verður tryggjað, og at skipanin hevur avlop nú, meðan arbeiðsloysið er lágt.

Tí er umráðandi, at neyðugar broytingar verða gjørdar og koma at virka sum skjótast.

Tað er eisini umráðandi, at arbeiðsmarknaðarátøkini við førleikamenning halda fram og verða styrkt. Tað er ikki gott at ganga fyri einki, og tað er umráðandi, at fólk koma skjótari aftur til arbeiðis, og føroyskir arbeiðsgevarar skjótari fáa skikkaða arbeiðsmegi til tey arbeiðini, sum eru tøk.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá skipanini

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2014 til 31. desember 2014 vísir eitt avlop á 5.513.603 krónur móti einum halli á 28.520.331 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2013 til 31. desember 2013.

Hóast framgongd metir leiðslan ikki, at úrslitið er nøktandi, tí tá arbeiðsloysið er so lágt, sum tað hevur verið í 2014, eigur skipanin at hava enn størri avlop. Hevði Arbeiðsloysisskipanin ikki havt eingangsinntøkur á 5,6 mió. krónur frá búnum eftir Faroe Seafood, so hevði skipanin havt hall í 2014. Tí er sera umráðandi at gera broytingar í skipanini, so hon verður haldfør.

Gjaldførið er enn gott, og tøkur peningur, áogn og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini vuksu í 2014 við 8,5 mió. krónum úr 288,1 mió. krónum upp í 296,7 mió. krónur.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá roknskaparloki til í dag er einki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.



# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2014<br>DKK | 2013<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **Inngjøld** | **189.880.333** | **183.489** |
| | Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | -165.982.010 | -196.357 |
| | Aðrir kostnaðir | -9.707.622 | -7.735 |
| | **Bruttovinningur** | **14.190.701** | **-20.603** |
| 1 | Starvsfólkaútreiðslur | -15.876.222 | -14.950 |
| | **Úrslit áðrenn av- og niðurskriving** | **-1.685.521** | **-35.553** |
| | Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | -2.160.690 | -2.882 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-3.846.211** | **-38.435** |
| | Fíggjarpostar | 11.261.439 | 11.774 |
| | **Úrslit áðrenn skatt og avgjøld** | **7.415.228** | **-26.661** |
| | Skattur og avgjøld | -1.897.315 | -1.859 |
| | **Úrslit** | **5.517.913** | **-28.520** |

**Býti av úrsliti**

| | | |
|---|---|---|
| Skotið verður upp at býta úrslitið soleiðis: | | |
| At flyta til næsta ár | 5.517.913 | -28.520 |
| **Tilsamans** | **5.517.913** | **-28.520** |

# Fíggjarstøða

**OGN**

| Nota | | 31.12.14<br>DKK | 31.12.13<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 2 | Grundøki og bygningar | 27.018.010 | 27.246 |
| 2 | Tøkniogn og maskinur | 0 | 1.642 |
| 2 | Rakstrargøgn og innbúgv | 0 | 338 |
| | **Materiell støðisogn tilsamans** | **27.018.010** | **29.226** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **27.018.010** | **29.226** |
| | Skuldarar | 15.316.487 | 9.209 |
| | Onnur áogn | 747.849 | 0 |
| | Tíðaravmarkingar | 0 | 264 |
| | **Áogn tilsamans** | **16.064.336** | **9.473** |
| | Virðisbrøv | 268.848.707 | 270.739 |
| | **Virðisbrøv og kapitalpartar tilsamans** | **268.848.707** | **270.739** |
| | **Tøkur peningur** | **11.748.680** | **7.906** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **296.661.723** | **288.118** |
| | **Ogn tilsamans** | **323.679.733** | **317.344** |

**SKYLDUR**

| Nota | | 31.12.14<br>DKK | 31.12.13<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 3 | Stovnsfæ | 93.840.006 | 93.840 |
| 3 | Flutt úrslit | 218.559.315 | 213.041 |
| | **Eginogn tilsamans** | **312.399.321** | **306.881** |
| | Vøru- og tænastuskuld | 1.845.968 | 1.475 |
| | Onnur skuld | 9.434.444 | 8.988 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **11.280.412** | **10.463** |
| | **Skuld tilsamans** | **11.280.412** | **10.463** |
| | **Skyldur tilsamans** | **323.679.733** | **317.344** |

4 Veðsetingar og aðrar skyldur

# Pengastreymsuppgerð

| | 2014<br>DKK | 2013<br>t.DKK |
|---|---:|---:|
| **Ársúrslit** | **5.517.913** | **-28.520** |
| Avskrivingar | 2.160.690 | 2.881 |
| Broyting í rakstrarpeningi: | | |
| Áogn | -6.590.880 | -519 |
| Ognarar | 371.407 | -460 |
| Onnur skuld | 603.209 | 825 |
| **Pengastreymar frá rakstrinum** | **2.062.339** | **-25.793** |
| **Samlaðir pengastreymar í árinum** | **2.062.339** | **-25.793** |
| Gjaldføri við ársbyrjan | 278.535.048 | 304.328 |
| **Gjaldføri við árslok** | **280.597.387** | **278.535** |
| Gjaldføri við árslok verður útgreinað soleiðis: | | |
| Tøkur peningur | 11.748.680 | 7.796 |
| Virðisbrøv | 268.848.707 | 270.739 |
| **Tilsamans** | **280.597.387** | **278.535** |



# Nýttur roknskaparháttur

**ALMENT**

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvar við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í miðalstóra C-flokkinum, við teimum tillaginum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva skipanini fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr skipanini, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Umrokning av fremmandum gjaldoyra**

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

**RAKSTRARROKNSKAPUR**

**Inntøkur**

Gjøld frá løntakarum og arbeiðsgevarum v.m. verða inntøkuførd í tí roknskaparári, sum lønin, ALS-gjaldið verður roknað av, verður goldin. Inntøkur frá sjálvstøðugt vinnurekandi verða inntøkuførdar einaferð árliga, og tryggingartakarin hevur yvirtikið skylduna fyri árslok.

**Útgjøld**

Útgjøldini eru tíðargreinaðið soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men sum hoyra heima í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni ultimo í roknskaparárinum.

**Aðrir kostnaðir**

Her er talan um kostnað í samband við útbreiðslu (distributión), marknaðarføring, umsiting, hølir og tap av ágóða.

**Starvsfólkaútreiðslur**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Avskrivingar**

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av og materiellari støðisogn.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

### Skattur og avgjøld

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu.

Posturin umfatar meirvirðisgjald, ið stavar frá keypi av vørum og tænastum.

### FÍGGJARSTØÐA

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 50 ár | 32% |

### Onnur virðisbrøv og kapitalpartar

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, sum eru upptiknir í ogn í umferð, umfata børsskrásett lánsbrøv og partabrøv, sum verða upptikin til dagsvirði seinasta roknskapardag. Virðisbrøv, sum ikki eru børsskrásett, verða upptikin til eitt søluvirði, sum er grundað á eitt roknað kapitalvirði.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til netto-realisatiónsvirðið.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

### Skuld

Stuttfreistað skuld verður tikin við til tann kostprís, sum hon er niðurgoldin til. Hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

### PENGASTREYMSUPPGERÐ

Pengastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísur pengastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í pengastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Pengastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki-likvidar rakstrarpostar og broyting í rakstrarkapitali.

Pengastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av materiellari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevnda posti.

Tøkur peningur við ársbyrjan og -enda er samansettur av tøkum peningi og virðisbrøvum.

| | 2014 DKK | 2013 t.DKK |
|---|---|---|
| **1. Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| Lønir | 13.568.457 | 12.945 |
| Eftirløn | 1.570.763 | 1.366 |
| Almenn gjøld | 575.488 | 502 |
| Aðrar starvsfólkaútreiðslur | 161.514 | 137 |
| Tilsamans | 15.876.222 | 14.950 |
| Harav samsýning til stjórn og stýrið | 1.069.789 | 2.065 |
| Miðaltal av starvsfólkum | 39 | 34 |

Umframt starvsfólkaútreiðslurnar omanfyri er starvsfólkakostnaður eisini innroknaður sum partur av útreiðslum til arbeiðsleys. Hesin kostnaður er í sambandi við Fjølsmiðjuna og Vakstrarhúsið og var fyri 2014 ávíkavíst kr. 922.165 og kr. 890.161, harav vanlig løn var tilsamans kr. 1.419.450

**2. Materiell støðisogn**

| Upphædd í DKK | Grundøki og bygningar | Tøkniogn og maskinur | Rakstrargøgn innbúgv |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði pr. 31.12.13 | 28.672.622 | 17.392.984 | 3.047.786 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| Útveganarvirði pr. 31.12.14 | 28.672.622 | 17.392.984 | 3.047.786 |
| Av- og niðurskrivingar pr. 31.12.13 | 1.426.930 | 15.750.889 | 2.756.873 |
| Av- og niðurskrivingar í árinum | 227.682 | 1.642.095 | 290.913 |
| Av- og niðurskrivingar pr. 31.12.14 | 1.654.612 | 17.392.984 | 3.047.786 |
| Roknskaparligt virði pr. 31.12.13 | 27.018.010 | 0 | 0 |

**3. Eginogn**

| Upphædd í DKK | Stovnsfæ | Flutt úrslit |
|---|---|---|
| *Eginognaruppgerð 01.01.13 - 31.12.13* | | |
| Salda pr. 31.12.12 | 93.840.006 | 241.561.733 |
| Flutt úrslit | 0 | -28.520.331 |
| Salda pr. 31.12.13 | 93.840.006 | 213.041.402 |
| *Eginognaruppgerð 01.01.14 - 31.12.14* | | |
| Salda pr. 31.12.13 | 93.840.006 | 213.041.402 |
| Flutt úrslit | 0 | 5.517.913 |
| Salda pr. 31.12.14 | 93.840.006 | 218.559.315 |

| Býti av stovnsfæ: | 2014 DKK |
|---|---|
| Føroya Landsstýri | 20.000.000 |
| Arbeiðsgevarar | 29.775.400 |
| Løntakarar | 30.139.356 |
| Frítíðargrunnurin | 13.925.250 |
| Salda pr. 31.12.13 | 93.840.006 |

**4. Veðsetingar og aðrar skyldur**

Ognirnar hjá skipanini eru ikki veðsettar.
Tað áhvílur ikki skipanini aðrar møguligar skyldur so sum ábyrgdir, vekslar v.m.

